Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 18. september 2020
Mál nr.: 0617-010/18
Málsviðgjørt: GMN

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	Uppskot til **Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)** (Landasvik og onnur brotsverk móti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni)
	§ 1 Í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Heitið á parti II (Særlig del) verður orðað soleiðis:

Særlig del	"**Partur II** **Serligur partur**"
	2. Kapittul 12 verður orðaður soleiðis:
12te kapitel. **Forbrydelser mod statens selvstændighed og sikkerhed.**	"**Kapittul 12** **Landasvik og onnur brotsverk móti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.**
§ 98. Den, som foretager en handling, der sigter til ved udenlandsk bistand, ved magtanvendelse eller ved trussel derom at bringe den danske stat eller nogen del af denne under fremmed herredømme eller at løsrive nogen del af staten, straffes med fængsel indtil på livstid. *Stk. 2.* Efter bestemmelsen i stk. 1 straffes også den, som med det nævnte formål iværksætter mere omfattende sabotage, produktions- eller trafikstandsning, samt den, der deltager i sådan foranstaltning vidende om, hvortil handlingen sigter.	**§ 98.** Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu at loysa ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð. *Stk. 2.* Eftir ásetingini í stk. 1 verður eisini tann revsaður, sum við nevnda endamáli skipar fyri umfatandi sabotasju, framleiðslustongsli ella ferðslustongsli, og tann, sum luttekur í slíkum virksemi og er vitandi um endamálið við tí.
§ 99. Den, som foretager en handling, der sigter til at påføre den danske stat eller nogen med den for krigstilfælde forbunden stat krig, besættelse eller andre fjendtligheder såsom blokade eller anden tvangsforanstaltning, eller som i øvrigt virker for, at den danske stats bestemmelsesfrihed ved udenlandsk bistand krænkes, straffes med fængsel indtil på livstid. *Stk. 2.* Ved besættelse forstås her og andetsteds i kapitlerne 12 og 13 fremmed besættelse af dansk statsområde, når og sålænge den påtvinges landet ved magtanvendelse eller trusel derom.	**§ 99.** Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at koma Føroyum ella okkara sameindu út í kríggj, herseting ella annan fíggindaskap, sum til dømis avbyrging ella annan tvingsil, ella sum aðramáta virkar fyri at skerja avgerðarrætt Føroya við útlendskari hjálp, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð. *Stk. 2.* Við herseting er her og aðrastaðni í kapitlunum 12 og 13 at skilja fremmand herseting av Føroyum, tá ið og so leingi hon verður sett í verk við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu.
§ 100. Den, som ved offentlige udtalelser tilskynder til, eller som fremkalder øjensynlig fare for fjendtlige forholdsregler mod den danske stat, straffes med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Den, som ved offentlige udtalelser tilskynder til, eller som fremkalder øjensynlig fare for fremmed magts	**§ 100.** Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri fíggindaskapi ímóti Føroyum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Tann, sum við almennum útsøgnum eggjar til ella sum fremur eyðsýndan vanda fyri, at fremmandavald leggur seg út í føroysk viðurskifti,

indblanding i den danske stats anliggender, straffes med bøde eller fængsel indtil 1 år.	verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár.
§ 101. Den, som med krig, besættelse eller andre fjendtligheder for øje foretager nogen handling, hvorved bistand til fjenden forberedes, straffes med fængsel indtil 16 år.	**§ 101.** Tann, sum við kríggi, herseting ella øðrum fíggindaskapi í hyggju fremur eina gerð, sum fyrireikar stuðul til fíggindan, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
§ 102. Den, som under krig eller besættelse yder fjenden bistand ved råd eller dåd eller til fremme af fjendtlig interesse svækker den danske stats eller dens forbundsfælles kampdygtighed, straffes med fængsel indtil 16 år. *Stk. 2.* Som bistand til fjenden anses således følgende forhold: 1) Hvervning til eller tjenstgøring i fjendtlig krigs- eller besættelsesmagts væbnede styrker eller i tilknytning til disse virkende militære eller politimæssige korps eller lignende korps eller organisationer. 2) Udførelse af hverv som civil funktionær under fjendtlig krigs- eller besættelsesmagts politi- eller fængselsvæsen, for så vidt hvervet omfatter deltagelse i afhøring eller bevogtning af fanger. 3) Angiveri eller lignende medvirken til, at nogen af fjendtlig myndighed eller dermed samarbejdende organisation eller person anholdes eller udsættes for anholdelse eller overlast. 4) Propaganda til fordel for fjendtlig krigs- eller besættelsesmagt, herunder virksomhed som udgiver, redaktør eller forretningsfører ved dagblad, tidsskrift, forlag eller pressebureau, der arbejder til fremme af fjendtlig interesse. 5) Ydelse af væsentlig økonomisk støtte til fremme af propaganda af den under nr. 4 nævnte art eller til parti eller organisation, der på utilbørlig måde samarbejder med den fjendtlige krigs- eller besættelsesmagt eller virker til fremme af dennes interesser. *Stk. 3.* Har angiveri, jfr. stk. 2, nr. 3, fundet sted under sådanne omstændigheder, at	**§ 102.** Tann, sum í kríggi ella undir herseting stuðlar fíggindanum við ráði ella verki, ella sum fyri at fremja fíggindalig áhugamál veikir stríðsføri ríkisins ella stríðsfelaga tess, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár. *Stk. 2.* Sum stuðul til fíggindan eru at rokna hesi viðurskifti: 1) Innskriving til ella hertænasta fyri vápnað lið hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi ella fyri tilknýtta hernaðardeild ella løgregludeild ella aðra tílíka deild ella annan tílíkan felagsskap. 2) Sivilt funktionerarbeiði undir løgreglumyndugleika ella fongsulsmyndugleika hjá fíggindaligum hernaðarvaldi ella hersetingarvaldi, um arbeiðið fevnir um luttøku í avhoyringum ella vaktarhaldi av fangum. 3) Smettan ella líknandi gerð, sum elvir til, at onkur verður handtikin ella verður fyri handtøku ella meini av fíggindaligum myndugleika ella samstarvandi felagsskapi ella persóni. 4) Propaganda fyri fíggindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, herímillum virksemi sum útgevari, ritstjóri ella fyrisitari á dagblaði, tíðarriti, forlagi ella tíðindastovu, sum arbeiðir fyri at fremja fíggindalig áhugamál. 5) Munandi fíggjarligan stuðul til at fremja propagandu soleiðis sum hon er lýst undir nr. 4, ella til flokk ella felagsskap, sum á óhøviligan hátt samstarvar við fíggindaliga

gerningsmanden har indset, at nogen derved blev udsat for overhængende fare for at miste livet, lide alvorlig skade på legeme eller helbred, blive ført ud af landet eller blive berøvet friheden i længere tid, eller er overtrædelse af §§ 245, 246 eller 250 begået for derved at fremtvinge forklaring eller tilståelse eller i øvrigt som led i mishandling af fanger, kan fængsel på livstid idømmes.	hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið ella fremur áhugamál tess. *Stk. 3.* Er talan um smettan sambært stk. 2, nr. 3, sum er gjørd undir slíkum umstøðum, at gerningsmaðurin hevur skilt, at hann er komin onkrum í hóttandi vanda fyri at missa lívið, fáa munandi skaða á likam ella heilsu, verða førdur av landinum ella verða frælsisskerdur í longri tíð, ella er brot framt á §§ 245, 246 ella 250 fyri at á tann hátt at tvinga fram frágreiðing ella játtan ella aðraməta sum liður í mishandling av fangum, kann fongsul upp til lívstíð dømast.
§ 103. Den, som under krig eller besættelse eller under truende udsigt dertil misligholder en kontrakt, der vedrører de af den danske stat i den anledning trufne foranstaltninger, eller som på anden måde modvirker sådanne foranstaltninger, straffes med fængsel indtil 3 år. *Stk. 2.* Har misligholdelsen fundet sted af grov uagtsomhed, er straffen bøde eller fængsel indtil 4 måneder.	**§ 103.** Tann, sum í kríggi ella undir herseting, ella tá ið stórur vandi er fyri kríggi ella herseting, misrøkir sáttmála viðvíkjandi fyriskipanum, ið føroyskir myndugleikar av hesi orsøk hava avgjørt at seta í verk, ella sum aðraməta arbeiðir ímóti slíkum fyriskipanum, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár. *Stk. 2.* Er sáttmálin misrøktur av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.
§ 104. Den, som på utilbørlig måde, direkte eller gennem mellemled, i erhvervsmæssig henseende samarbejder med fjendtlig krigs- eller besættelsesmagt, straffes med bøde eller fængsel indtil 8 år. *Stk. 2.* Strafansvar efter stk. 1 kan pålægges enhver, der har haft en ledende stilling i vedkommende virksomhed. Strafansvar kan ligeledes pålægges andre i virksomheden beskæftigede personer, når der for deres vedkommende foreligger en særlig stødende optræden. *Stk. 3.* Ved afgørelsen af, om og i hvilken grad forholdet må anses for utilbørligt, vil foruden virksomhedens betydning for den fjendtlige krigs- eller besættelsesmagt navnlig være at tage i betragtning, hvorvidt vedkommende 1) selv har været aktiv for at få forretningsforbindelse indledet, fortsat eller udvidet,	**§ 104.** Tann, sum á óhøviligan hátt, beinleiðis ella gjøgnum millumlið, samstarvar vinnuliga við figgindaligt hernaðarvald ella hersetingarvald, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 8 ár. *Stk. 2.* Revsiábyrgd eftir stk. 1 kann verða løgd á ein og hvønn, sum hevur havt leiðandi starv í viðkomandi fyritøku. Revsiábyrgd kann somuleiðis verða løgd á onnur starvsfólk í fyritøkuni, um tey fyri sín part hava havt serliga ódámliga framferð. *Stk. 3.* Tá ið gjørt verður av, um framferðin hevur verið óhøvilig, og hvussu óhøvilig hon hevur verið, skal umframt týdningin, sum fyritøkan hevur fyri tað figgindaliga hernaðarvaldið ella hersetingarvaldið, serliga verða havt í huga, um viðkomandi:

2) i fjendens interesse på eget initiativ har foretaget en omlægning af virksomheden eller ydet eller forsøgt at yde større eller hurtigere produktion end påkrævet, 3) har påkaldt fjendens bistand over for danske myndigheder til fremme af sine interesser, 4) har hindret eller søgt at hindre danske myndigheder i at få fuld adgang til at blive bekendt med virksomhedens forhold eller 5) har opnået eller søgt at opnå urimelig fortjeneste eller andre fordele, der ikke har været forretningsmæssig rimeligt begrundede.	1) sjálvur hevur virkað fyri at fáa í lag, halda fram við ella víðka um handilssambandið, 2) til frama fyri figgindan av sínum eintingum hevur umskipað fyritøkuna ella hevur fingið ella hevur roynt at fáa størri ella skjótari framleiðslu enn kravt, 3) hevur biðið figgindan hjálpa sær mótvegis føroyskum myndugleikum til frama fyri egin áhugamál, 4) hevur forðað ella roynt at forða føroyskum myndugleikum at fáa fulla atgongd at kunna seg um viðurskifti hjá fyritøkuni, ella 5) hevur fingið ella roynt at fáa órímiligan vinning ella aðrar fyrimunir, sum ikki hava verið rímiliga grundaðir handilsliga.
§ 105. Den, som under besættelse foretager en handling, der sigter til at formå besættelsesmagten eller nogen med denne samarbejdende organisation eller person til at krænke danske myndigheders bestemmelsesfrihed, eller som på utilbørlig måde udnytter forbindelse med besættelsesmagten eller nogen med denne samarbejdende organisation eller person til at skaffe sig eller andre særlig fordel, straffes med fængsel indtil 8 år.	**§ 105.** Tann, sum undir herseting fremur eina gerð, ið miðar eftir at fáa hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, til at gera seg inn á avgerðarrættin hjá føroyskum myndugleikum, ella sum á óhøviligan hátt misnýtir samband við hersetingarvaldið ella felagsskap ella persón, ið samstarvar við tað, fyri at vinna sær sjálvum ella øðrum serligan fyrimun, verður revsaður við fongsli í upp til 8 ár.
§ 106. Den, som handler mod statens tarv under varetagelsen af et ham overdraget hverv til på statens vegne at forhandle eller afgøre noget med fremmed stat, straffes med fængsel indtil 16 år.	**§ 106.** Tann, sum virkar ímóti tørvi landsins í starvi, sum honum er latið fyri Føroyar at samráðast um ella avgera eitthvørt við fremmant land, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár.
§ 107. Den, som i fremmed magts eller organisations tjeneste eller til brug for personer, der virker i sådan tjeneste, udforsker eller giver meddelelse om forhold, som af hensyn til danske stats- eller samfundsinteresser skal holdes hemmelige, straffes, hvad enten meddelelsen er rigtig eller ej, for spionage med fængsel indtil 16 år. *Stk. 2.* Såfremt det drejer sig om de i § 109 nævnte forhold, eller handlingen finder sted	**§ 107.** Tann, sum í tænastu fyri fremmant vald ella fremmandan felagsskap ella til nýtslu hjá nøkrum, sum er í slíkari tænastu, kannar ella gevur upplýsingar um viðurskifti, ið skulu haldast loynilig við fyriliti fyri landsáhugamálum ella samfelagsáhugamálum, verður, sama um upplýsingarnar eru rættar ella ei, revsaður fyri njósnan við fongsli í upp til 16 ár.

under krig eller besættelse, kan straffen stige indtil fængsel på livstid.	*Stk. 2.* Snýr tað seg um viðurskifti, sum nevnd eru í § 109, ella verður gerðin framd í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til lívstíð.
§ 108. Den, som, uden at forholdet falder ind under § 107, i øvrigt foretager noget, hvorved fremmed efterretningsvæsen sættes i stand til eller hjælpes til umiddelbart eller middelbart at virke inden for den danske stats område, straffes med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Såfremt det drejer sig om efterretninger vedrørende militære anliggender, eller virksomheden finder sted under krig eller besættelse, kan straffen stige indtil fængsel i 12 år.	**§ 108.** Tann, sum, hóast gerðin ikki kemur undir § 107, í aðraláta ger nakað, sum gevur fremmandari fregnartænastu møguleikan til, ella sum hjálpir henni til beinleiðis ella óbeinleiðis at virka í landinum, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Snýr tað seg um upplýsingar um hernaðarlig viðurskifti, ella verður virksemið framt í kríggi ella undir herseting, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 12 ár.
§ 109. Den, som røber eller videregiver meddelelse om statens hemmelige underhandlinger, rådslagninger eller beslutninger i sager, hvorpå statens sikkerhed eller rettigheder i forhold til fremmede stater beror, eller som angår betydelige samfundsøkonomiske interesser overfor udlandet, straffes med fængsel indtil 12 år. *Stk. 2.* Foretages de nævnte handlinger uagtsomt, er straffen fængsel indtil 3 år eller under formildende omstændigheder bøde.	**§ 109.** Tann, sum avdúkar ella víðarigevur upplýsingar um loyniligar samráðingar, ráðleggingar ella avgerðir hjá landinum í málum, sum trygd landsins ella rættindi við fremmand lond er treytað av, ella sum snúgva seg um týðandi samfelagsbúskaparlig áhugamál við útlond, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár. *Stk. 2.* Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.
§ 110. Den, som forfalsker, ødelægger eller bortskaffer noget dokument eller anden genstand, der er af betydning for statens sikkerhed eller rettigheder i forhold til fremmede stater, straffes med fængsel indtil 16 år. *Stk. 2.* Foretages de nævnte handlinger uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 3 år.	**§ 110.** Tann, sum falsar, oyðileggur ella burturbeinir skjal ella lut, sum hevur týdning fyri trygd landsins ella rættindi við fremmand lond, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár. *Stk. 2.* Verða nevndu gerðir gjørdar av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 3 ár.
§ 110 a. Med bøde eller fængsel indtil 3 år straffes den, som forsætligt eller uagtsomt uden behørig tilladelse 1) beskriver, fotograferer eller på anden måde afbilder danske ikke almentilgængelige militære forsvarsanlæg,	**§ 110 a.** Við sekt ella fongsli í upp til 3 ár verður tann revsaður, sum tilætlað ella av ósketni uttan neyðugt loyvi: 1) greiðir frá, tekur mynd av ella á annan hátt avmyndar hernaðarligar verjustøðir, goymslur, deildir, vápn,

depoter, enheder, våben, materiel el.lign., eller som mangfoldiggør eller offentliggør sådanne beskrivelser eller afbildninger, 2) offentliggør bestemmelser, der vedrører danske stridskræfters mobilisering og andet krigsberedskab. *Stk. 2.* Med bøde straffes den, som forsætligt eller uagtsomt uden behørig tilladelse optager fotografier fra luftfartøj over dansk statsområde eller offentliggør sådanne ulovligt optagne fotografier.	útgerð ella tílíkt hjá ríkinum, sum ikki er almannaatgongt, ella sum margfaldar ella almannakunnger tílíkar frágreiðingar ella myndir, ella 2) almannakunnger avgerðir, sum snúgva seg um herbúgving til stríð ella aðra hernaðartilbúgving hjá ríkinum.
§ 110 b. Med fængsel indtil 8 år straffes den, som medvirker til neutralitetskrænkelser mod den danske stat fra en fremmed magts side.	**§ 110 b**. Við fongsli í upp til 8 ár verður tann revsaður, sum viðvirkar til, at fremmandavald ger seg inn á uttanveltastøðu ríkisins.
§ 110 c. Den, som overtræder bestemmelser eller forbud, som i henhold til lov måtte være givet til værn for statens forsvars- eller neutralitetsforanstaltninger, straffes med bøde eller fængsel indtil 4 måneder eller under særligt skærpende omstændigheder med fængsel indtil 3 år. *Stk. 2.* Med bøde eller fængsel indtil 4 måneder eller under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 4 år straffes den, som forsætligt eller uagtsomt overtræder bestemmelser eller forbud, som i henhold til lov måtte være givet til gennemførelse af statens forpligtelser som medlem af De Forenede Nationer. *Stk. 3.* Begås en forbrydelse som nævnt i stk. 1 eller 2 uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 2 år.	**§ 110 c.** Tann, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg sum vernd av verjufyriskipan ella uttanveltafyriskipan ríkisins, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 3 ár. *Stk. 2.* Við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg fyri at kunna røkja skyldur ríkisins sum limur í Sameindu tjóðum. *Stk. 3.* Verður brot framt á stk. 1 ella 2 av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.
§ 110 d. Begås nogen af de i kapitlerne 25, 26 og 27 omhandlede forbrydelser mod et fremmed statsoverhoved eller lederen af en fremmed diplomatisk mission, kan den dér foreskrevne straf forhøjes med indtil det halve, medmindre forholdet er omfattet af kapitel 13.	**§ 110 d.** Verður nakað av teimum brotsverkum, sum lýst eru í kapitlunum 25, 26 og 27, framt ímóti útlendskum ríkisleiðara ella leiðara á útlendskari sendistovu, kann revsingin, sum har er lýst, vaksa við upp í eina helvt, um ikki gerðin er fevnd av kapitli 13.
§ 110 e. Med bøde eller fængsel indtil 2 år straffes den, der offentlig forhåner en fremmed nation, en fremmed stat, dens flag eller andet anerkendt nationalmærke eller	**§ 110 e.** Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum alment háðar fremmanda tjóð, fremmant land, flagg tess ella annað viðurkent

De Forenede Nationers eller Det Europæiske Råds flag. **§ 110 f.** De i dette kapitel omhandlede forbrydelser er i alle tilfælde genstand for offentlig påtale, der sker efter justitsministerens påbud.	tjóðarmerki ella flaggið hjá Sameindum tjóðum. **§ 110 f.** Brotsverk í hesum kapitli verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum. **§ 110 g.** Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 98–110 nevndu gerðir mótvegis danska statinum ella myndugleikum hansara undir hesum kongi, Fólkatingi og Hægstarætti.”
13de kapitel. **Forbrydelser mod statsforfatningen og de øverste statsmyndigheder, terrorisme m.v.** **§ 111.** Den, som foretager en handling, der sigter til ved udenlandsk bistand, ved magtanvendelse eller trusel derom at forandre statsforfatningen eller sætte den ud af kraft, straffes med fængsel indtil på livstid. **§ 112.** Den, som foretager nogen handling, der sigter til at berøve kongen eller den, der med hjemmel i forfatningen fører regeringen, livet, straffes med fængsel ikke under 6 år. **§ 113.** Den, som antaster folketingets sikkerhed eller frihed eller i øvrigt foretager nogen handling, der sigter til ved magtanvendelse eller trusel derom at aftvinge folketinget nogen beslutning eller hindre den i frit at udøve sin virksomhed, straffes med fængsel indtil 16 år eller under skærpende omstændigheder på livstid. *Stk. 2.* Samme straf kommer til anvendelse på den, der på tilsvarende måde angriber eller øver tvang mod kongen eller den, der med hjemmel i forfatningen fører regeringen, eller mod ministrene, rigsretten eller højesteret.	**3.** Kapittul 13 verður orðaður soleiðis: “**Kapittul 13** **Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga yvirgangur o.a.** **§ 111.** Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at broyta stýrisskipanina ella at seta hana úr gildi, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð. **§ 112.** Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir at taka lívið av tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, verður revsaður við fongsli í minst 6 ár. **§ 113.** Tann, sum ger seg inn á trygd ella frælsi Løgtingsins ella aðramáta fremur eina gerð, ið miðar eftir við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu at noyða Løgtingið til at taka eina avgerð ella at forða tí í at virka frítt og frælst, verður revsaður við fongsli í upp til 16 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til lívstíð. *Stk. 2.* Somu revsing fær tann, sum á samsvarandi hátt loypur á ella fremur tvingsil ímóti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, ella ímóti landsstýrismonnum.

§ 114. For terrorisme straffes med fængsel indtil på livstid den, som med forsæt til at skræmme en befolkning i alvorlig grad eller uretmæssigt at tvinge danske eller udenlandske offentlige myndigheder eller en international organisation til at foretage eller undlade at foretage en handling eller at destabilisere eller ødelægge et lands eller en international organisations grundlæggende politiske, forfatningsmæssige, økonomiske eller samfundsmæssige strukturer begår en eller flere af følgende handlinger, når handlingen i kraft af sin karakter eller den sammenhæng, hvori den begås, kan tilføje et land eller en international organisation alvorlig skade: 1) Manddrab efter § 237. 2) Grov vold efter § 245 eller § 246. 3) Frihedsberøvelse efter § 261. 4) Forstyrrelse af trafiksikkerheden efter § 184, stk. 1, retsstridige forstyrrelser i driften af almindelige samfærdselsmidler m.v. efter § 193, stk. 1, eller groft hærværk efter § 291, stk. 2, hvis disse overtrædelser begås på en måde, der kan bringe menneskeliv i fare eller forårsage betydelige økonomiske tab. 5) Kapring af transportmidler efter § 183 a. 6) Grove våbenlovsovertrædelser efter § 192 a eller § 7 i lagtingslov om våben m.v. 7) Brandstiftelse efter § 180, sprængning, spredning af skadevoldende luftarter, oversvømmelse, skibbrud, jernbane- eller anden transportulykke efter § 183, stk. 1 og 2, sundhedsfarlig forurening af vandforsyningen efter § 186, stk. 1, sundhedsfarlig forurening af ting bestemt til almindelig udbredelse m.v. efter § 187, stk. 1. 8) Besiddelse eller anvendelse m.v. af radioaktive stoffer efter § 192 b. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, som med det i stk. 1 nævnte forsæt transporterer våben eller eksplosivstoffer. *Stk. 3.* Endvidere straffes på samme måde den, der med det i stk. 1 nævnte forsæt truer med at begå en af de i stk. 1 og 2 nævnte handlinger.	**§ 114.** Fyri yvirgang verður tann revsaður við fongsli í upp til lívstíð, sum við ætlan um at loypa stóra ræðslu á íbúgvarnar í einum landi, ella av óróttum at tvinga føroyskar ella útlendskar almennar myndugleikar ella altjóða felagsskap til at gera ella lata vera við at gera okkurt, ella at avlaga ella oyðileggja grundleggjandi politiska, stýrisskipanarliga, búskaparliga ella samfelagsliga bygnaðin í einum landi ella altjóða felagsskapi, fremur eina ella fleiri av fylgjandi gerðum, tá ið slagið av gerð ella samanhangurin, gerðin verður framd í, kann gera einum landi ella altjóða felagsskapi munandi skaða: 1) Manndráp eftir § 237. 2) Grovan harðskap eftir §§ 245 ella 246. 3) Frælsistøku eftir § 261. 4) Órógv á ferðslutrygdina eftir § 184, stk. 1, ólógligt órógv á raksturin av vanligum samferðslutólum o.ø. eftir § 193, stk. 1, ella umfatandi herverk eftir § 291, stk. 2, um hesi lógarbrot verða framd á ein hátt, sum kann koma mannalívum í vanda ella hava við sær munandi fíggjarligt tap. 5) Rán av flutningsfari eftir § 183 a. 6) Brot á lóggávuna um vápn og spreingievni undir serliga skerpandi umstøðum eftir § 192 a. 7) Eldáseting eftir § 180, spreinging, spjaðing av skaðaelvandi loftevni, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku eftir § 183, stk. 1 og 2, heilsuskaðiliga dálking av vatnveiting eftir § 186, stk. 1, heilsuskaðiliga dálking av lutum, ætlað til vanliga útbreiðslu o.a. eftir § 187, stk. 1. 8) Handhavan ella nýtslu o.a. av geislavirknum evnum eftir § 192 b. *Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, flytur vápn ella spreingievni. *Stk. 3.* Á sama hátt verður eisini tann revsaður, sum við teirri tilætlan, ið nevnd er í stk. 1, hóttir við at fremja

	onkra av teimum gerðum, sum nevndar eru í stk. 1 og 2.
§ 114 a. Begås en af de i nr. 1-6 nævnte handlinger, uden at forholdet omfattes af § 114, kan straffen overstige den højeste for lovovertrædelsen foreskrevne straf med indtil det halve. Hvis den højeste straf, der er foreskrevet for den pågældende handling, er mindre end 4 års fængsel, kan straffen dog stige til fængsel indtil 6 år. 1) Overtrædelse af § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 eller 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, stk. 2, § 193, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, 250, § 252, stk. 1, § 266, § 288 eller § 291, stk. 1 eller 2, når handlingen er omfattet af artikel 1 i konventionen af 16. december 1970 om bekæmpelse af ulovlig bemægtigelse af luftfartøjer, artikel 1 i konventionen af 23. september 1971 til bekæmpelse af ulovlige handlinger mod den civile luftfarts sikkerhed eller artikel II i protokollen af 24. februar 1988 til bekæmpelse af ulovlige voldshandlinger i lufthavne, der betjener den internationale civile luftfart, jf. bilag 1, nr. 1 og 2. 2) Overtrædelse af § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 eller 2, § 184, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, 250, § 252, stk. 1, § 260, § 261, stk. 1 eller 2, § 266 eller § 291, stk. 1 eller 2, når handlingen er omfattet af artikel 2 i konventionen af 14. december 1973 om forebyggelse af og straf for forbrydelser mod internationalt beskyttede personer, herunder diplomatiske repræsentanter, jf. bilag 1, nr. 3. 3) Overtrædelse af § 261, stk. 1 eller 2, når handlingen er omfattet af artikel 1 i den internationale konvention af 17. december 1979 imod gidseltagning, jf. bilag 1, nr. 4. 4) Overtrædelse af § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 eller 2, § 186, stk. 1, § 192 a, stk. 2, §§ 192 b, 237, 244, 245, 246, 260, 266, 276, 278, 279, 279 a, 281, 288 eller § 291, stk. 2, når handlingen er omfattet af artikel 7 i IAEA-	**§ 114 a.** Verður ein av gerðunum í nr. 1–7 framd, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir § 114 eru til staðar, kann revsingin fara upp um strangastu revsingina fyri lógarbrotið við upp í eina helvt. Er strangasta revsing fyri viðkomandi gerð minni enn 4 ára fongsul, kann hon tó vaksa til fongsul í upp til 6 ár: 1) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, 250, § 252, stk. 1, § 266, § 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 16. desember 1970 um at basa ólógligari valdstøku av loftførum, artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 23. september 1971 um at basa ólógligum gerðum móti trygdini í sivilu loftferðsluni ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 24. februar 1988 um at basa ólógligum valdsgerðum í floghavnum, sum avgreiða altjóða sivilu loftferðsluna, sambært skjali 1, nr. 1 og 2. 2) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 184, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, 250, § 252, stk. 1, § 260, § 261, stk. 1 ella 2, § 266 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli II í millumtjóðasáttmála frá 14. desember 1973 um at fyribyrgja og revsa brotsverk ímóti altjóða vardum persónum, herímillum sendifólkum, sambært skjali 1, nr. 3. 3) Brot á § 261, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 1 í millumtjóðasáttmála frá 17. desember 1979 ímóti gíslatøku, sambært skjali 1, nr. 4. 4) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 186, stk. 1, §§ 192 a, 192 b, 237, 244–246, 260, 266, 276, 278, 279, 279 a, 281, 288 ella § 291,

konventionen (Det Internationale Atomenergi-agenturs konvention) af 3. marts 1980 om fysisk beskyttelse af nukleare materialer, jf. bilag 1, nr. 5. 5) Overtrædelse af § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 eller 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, stk. 2, § 193, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, § 252, stk. 1, §§ 260, 266, 288 eller § 291, stk. 1 eller 2, når handlingen er omfattet af artikel 3 i konventionen af 10. marts 1988 til bekæmpelse af ulovlige handlinger mod søfartssikkerheden eller artikel 2 i protokollen af 10. marts 1988 til bekæmpelse af ulovlige handlinger mod sikkerheden for fastgjorte platforme, der befinder sig på kontinentalsokkelen, jf. bilag 1, nr. 6 og 7. 6) Overtrædelse af § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 eller 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 186, stk. 1, § 192 a, stk. 2, § 193, stk. 1, §§ 237, 244, 245, 246, 250, § 252, stk. 1, § 266 eller § 291, stk. 2, når handlingen er omfattet af artikel 2 i den internationale konvention af 15. december 1997 til bekæmpelse af terrorbombninger, jf. bilag 1, nr. 8.	stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 7 í IAEA-sáttmálanum, Sáttmálanum hjá The International Atomic Energy Agency, frá 3. mars 1980 um fysiska vernd av kjarnorkutilfari, sambært skjal 1, nr. 5. 5) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244–246, § 252, stk. 1, §§ 260, 266, 288 ella § 291, stk. 1 ella 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 3 í millumtjóðasáttmála frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum móti sjótrygdini ella artikli 2 í ískoytissáttmálanum frá 10. mars 1988 um at basa ólógligum gerðum móti trygdini á fastfestum oljupallum á landgrunninum, sambært skjali 1, nr. 6 og 7. 6) Brot á § 180, § 181, stk. 1, § 183, stk. 1 ella 2, § 183 a, § 184, stk. 1, § 186, stk. 1, § 192 a, § 193, stk. 1, §§ 237, 244–246, 250, § 252, stk. 1, § 266 ella § 291, stk. 2, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 15. desember 1997 um at basa yvirgangsbumbing, sambært skjali 1, nr. 8. 7) Brot á § 192 b, § 260 ella § 266, tá ið gerðin er fevnd av artikli 2 í millumtjóðasáttmála frá 13. apríl 2005 um at basa kjarnorkuyvirgangi, sambært skjali 1, nr. 9.
§ 114 b. Med fængsel indtil 10 år straffes den, som 1) direkte eller indirekte yder økonomisk støtte til, 2) direkte eller indirekte tilvejebringer eller indsamler midler til eller 3) direkte eller indirekte stiller penge, andre formuegoder eller finansielle eller andre lignende ydelser til rådighed for en person, en gruppe eller en sammenslutning, der begår eller har til	**§ 114 b.** Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum beinleiðis ella óbeinleiðis til ein persón, til ein bólk ella til eina samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja eina gerð, sum er fevnd av §§ 114 ella 114 a: 1) veitir fíggjarstuðul, 2) útvegar ella savnar inn fígging ella onnur ráð, ella 3) letur pening, ognarlutir ella fíggjarligar ella aðrar slíkar veitingar at ráða yvir.

hensigt at begå handlinger omfattet af § 114 eller § 114 a.	
§ 114 c. Med fængsel indtil 10 år straffes den, som hverver en person til at begå eller fremme handlinger omfattet af § 114 eller § 114 a eller til at slutte sig til en gruppe eller sammenslutning for at fremme, at gruppen eller sammenslutningen begår handlinger af denne karakter. Under særlig skærpende omstændigheder kan straffen stige til fængsel indtil 16 år. Som særlig skærpende omstændigheder anses navnlig tilfælde, hvor der er tale om overtrædelser af systematisk eller organiseret karakter. *Stk. 2.* Med fængsel indtil 6 år straffes den, som hverver en person til at begå eller fremme handlinger omfattet af § 114 b eller til at slutte sig til en gruppe eller sammenslutning for at fremme, at gruppen eller sammenslutningen begår handlinger af denne karakter. *Stk. 3.* Med fængsel indtil 6 år straffes den, som lader sig hverve til at begå handlinger omfattet af § 114 eller § 114 a.	**§ 114 c.** Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella samskipanin fremur gerðir av hesum slagi. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slagi. *Stk. 2.* Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum útvegar ein persón til at fremja ella stuðla undir gerðir, ið fevndar eru av § 114 b, ella til at fara upp í ein bólk ella eina samskipan fyri at stuðla undir, at bólkurin ella samskipanin fremur gerðir av hesum slagi. *Stk. 3.* Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum tekur við boði at fremja gerðir, ið fevndar eru av §§ 114 ella 114 a. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.
§ 114 d. Med fængsel indtil 10 år straffes den, som træner, instruerer eller på anden måde oplærer en person til at begå eller fremme handlinger omfattet af § 114 eller § 114 a med viden om, at personen har til hensigt at anvende færdighederne til dette formål. Under særlig skærpende omstændigheder kan straffen stige til fængsel indtil 16 år. Som særlig skærpende omstændigheder anses navnlig tilfælde, hvor der er tale om overtrædelser af systematisk eller organiseret karakter. *Stk. 2.* Med fængsel indtil 6 år straffes den, som træner, instruerer eller på anden måde oplærer en person til at begå eller fremme	**§ 114 d.** Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta førleikarnar til hetta endamál. Undir serliga skerpandi umstøðum kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna brot, sum eru av regluligum ella skipaðum slagi. *Stk. 2.* Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum venur, vegleiðir ella

handlinger omfattet af § 114 b med viden om, at personen har til hensigt at anvende de tillærte færdigheder til dette formål. *Stk. 3.* Med fængsel indtil 6 år straffes den, som lader sig træne, instruere eller på anden måde oplære til at begå handlinger omfattet af § 114 eller § 114 a.	á annan hátt lærir upp ein persón at fremja ella stuðla undir gerðir, ið eru fevndar av § 114 b, vitandi um, at persónurin ætlar at nýta teir tillærdu førleikarnar til hetta endamál. *Stk. 3.* Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum letur seg venja, vegleiða ella á annan hátt læra upp at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a.
§ 114 e. Med fængsel indtil 6 år straffes den, som i øvrigt fremmer virksomheden for en person, en gruppe eller en sammenslutning, der begår eller har til hensigt at begå handlinger omfattet af §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c eller 114 d.	**§ 114 e.** Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum á annan hátt stuðlar virksemi hjá persóni, bólki ella samskipan, sum fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114, 114 a, 114 b, 114 c ella 114 d. Virkar viðkomandi fyri eitt vápnað lið, kann revsingin vaksa til fongsul í upp til 10 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum til fongsul í upp til 16 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har viðkomandi hevur verið við í bardaga.
§ 114 f. Den, som, uden at forholdet omfattes af §§ 114-114 e, deltager i eller yder væsentlig økonomisk eller anden væsentlig støtte til korps, gruppe eller sammenslutning, der har til hensigt ved magtanvendelse at øve indflydelse på offentlige anliggender eller fremkalde forstyrrelse af samfundsordenen, straffes med fængsel indtil 6 år. **§ 114 g.** Den, som, uden at forholdet omfattes af §§ 114-114 f, deltager i ulovlig militær organisation eller gruppe, straffes med bøde eller fængsel indtil 2 år.	**§ 114 f.** Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114–114 e, luttekur í ella veitir munandi fíggjarstuðul ella annan munandi stuðul til deildir, bólkar ella samskipanir, sum við valdsnýtslu ætla at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. **§ 114 g.** Tann, sum, uttan at tilburðurin er fevndur av §§ 114–114 f, luttekur í ólógligum hernaðarligum felagsskapi ella bólki, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.
§ 114 h. Med fængsel indtil 6 år straffes den, der under skærpende omstændigheder i strid med lovgivningen om ikke spredning af masseødelæggelsesvåben m.v. 1) udfører produkter med dobbelt anvendelse uden tilladelse, 2) til brug for myndighedernes afgørelser om produkter med dobbelt anvendelse giver urigtige eller vildledende	**§ 114 h.** Tann, sum frá bólki ella samskipan, ið fremur ella ætlar at fremja gerðir, ið eru fevndar av §§ 114 ella 114 a, tekur ímóti peningaligum stuðli ella veitingum at brúka til at skipa ella reka stovn ella fyritøku ella til líknandi endamál her á landi, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár.

oplysninger eller fortier oplysninger af betydning for sagens afgørelse eller 3) handler i strid med vilkår, der er fastsat i myndighedernes afgørelser om produkter med dobbelt anvendelse.	
§ 115. Begås, uden at forholdet falder ind under §§ 112 og 113, nogen af de i kapitlerne 25, 26 og 27 omhandlede forbrydelser mod kongen eller den, der med hjemmel i forfatningen fører regeringen, forhøjes de i de nævnte bestemmelser foreskrevne straffe indtil det dobbelte. *Stk. 2.* Begås nogen af de nævnte forbrydelser mod dronningen, enkedronningen eller tronfølgeren, kan straffen forhøjes med indtil det halve.	**§ 115.** Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, gjørt móti tí, sum við heimild í stýrisskipanini leiðir landsstýrið, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.
§ 116. Den, som hindrer foretagelsen af valg til folketinget, Færøernes lagting eller til kommunale eller andre offentlige råd eller myndigheder eller gør forsøg herpå, eller som forvansker et valgs udfald eller umuliggør opgørelsen, straffes med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Samme straf finder anvendelse, når sådanne handlinger foretages ved lovhjemlede umiddelbare stemmeafgivninger i offentlige anliggender.	**§ 116.** Tann, sum forðar ella roynir at forða fyri, at val verður hildið til Løgtingið, Fólkatingið, kommunustýri ella til kommunal ella onnur almenn ráð ella myndugleikar, ella sum reingir valúrslit, ella sum ger tað ómøguligt at gera úrslitið upp, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Sama revsing verður nýtt, tá ið slíkar gerðir verða gjørdar í sambandi við lógarheimilaðar beinleiðis atkvøðugreiðslur um almenn viðurskifti.
§ 117. Med bøde eller fængsel indtil 2 år straffes den, som ved de i § 116 omhandlede valg eller stemmeafgivninger 1) uberettiget skaffer sig eller andre adgang til at deltage i afstemningen, 2) ved ulovlig tvang (§ 260), ved frihedsberøvelse eller ved misbrug af overordnelsesforhold søger at formå nogen til at stemme på en bestemt måde eller til at undlade at stemme, 3) ved svig bevirker, at nogen mod sin hensigt afholder sig fra at stemme, eller at hans stemmeafgivning bliver ugyldig eller virker anderledes end tilsigtet, 4) yder, lover eller tilbyder formuefordel for at påvirke nogen til at stemme på en vis måde eller til at undlade at stemme,	**§ 117.** Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum á teimum valum ella atkvøðugreiðslum, ið nevnd eru í § 116: 1) av órøttum skaffar sær ella øðrum atgongd til at luttaka í atkvøðugreiðsluni, 2) við ólógligum tvingsli sambært § 260 við frælsistøku ella við misnýtslu av støðu síni í hægri starvi roynir at fáa onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða, 3) við sviki elvir til, at onkur ímóti ætlan síni letur vera við at atkvøða, ella at atkvøðan hjá viðkomandi verður ógildig ella virkar øðrvísi enn ætlað,

5) modtager, fordrer eller lader sig tilsige formuefordel for at stemme på en vis måde eller for at undlade at stemme.	4) veitir, lovar ella bjóðar fram fíggjarligan fyrimun fyri at ávirka onkran til at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða, ella 5) tekur ímóti, krevur ella letur lova sær fíggjarligan fyrimun fyri at atkvøða á ávísan hátt ella til at lata vera við at atkvøða.
§ 118. Den, som ved magtanvendelse eller trusel derom eller under udnyttelse af frygt for fremmed magts indgriben hindrer eller søger at hindre offentlige myndigheder i den frie udøvelse af deres virksomhed, straffes, når handlingen foretages med det formål at øve indflydelse på offentlige anliggender eller fremkalde forstyrrelse af samfundsordenen, med fængsel indtil 12 år. *Stk. 2.* Samme straf finder anvendelse på den, som i den i stk. 1 nævnte hensigt og ved anvendelse af de dér nævnte midler alvorligt krænker ytringsfriheden eller hindrer foreninger eller andre sammenslutninger i frit at udøve deres lovlige virksomhed. *Stk. 3.* Med samme straf anses endvidere den, der i den i stk. 1 nævnte hensigt og under anvendelse af de dér nævnte midler begår den i § 193 omhandlede forbrydelse eller lignende almenskadelig handling.	**§ 118.** Tann, sum við valdsnýtslu ella hóttan um valdsnýtslu ella við misnýtslu av ótta fyri uppílegging frá fremmandavaldi forðar ella roynir at forða almennum myndugleika í at virka frítt og frælst, verður, tá ið gerðin verður framd fyri at ávirka almenn viðurskifti ella at elva til órógv á samfelagsskipanina, revsaður við fongsli í upp til 12 ár. *Stk. 2.* Somu revsing fær tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, ger seg álvarsliga inn á framsøgufrælsið ella forðar felagsskapum ella øðrum samskipanum í at útinna lógliga virksemi sítt frítt og frælst. *Stk. 3.* Somu revsing fær eisini tann, sum við teirri ætlan og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, fremur tað brotsverk, sum umrøtt er í § 193, ella aðra alvandasama gerð.
§ 118 a. De i §§ 111-115 og 118 omhandlede forbrydelser er i alle tilfælde genstand for offentlig påtale, der sker efter justitsministerens påbud.	**§ 118 a.** Brotsverkini, sum nevnd eru í §§ 111–115 og 118, verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum.
§ 118 b. (Strikað).	**§ 118 b.** Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 111–116 nevndu gerðir ímoti danska statinum ella myndugleikum hansara undir hesum kongi, Fólkatingi og Hægstarætti. *Stk. 2.* Verður brotsverk, sum nevnt er í kapitlunum 25, 26 og 27, framt móti kongi, uttan at treytirnar fyri at revsa eftir §§ 112 og 113 eru til staðar, verða revsingarnar, sum har eru lýstar, herdar upp til tað dupulta.

	Stk. 3. Verður eitt av nevndu brotsverkum framd ímóti drotning, einkjudrotning ella trónuarvinga, kann revsingin vaksa við upp í eini helvt.”
	4. Kapittul 20 verður orðaður soleiðis:
20de kapitel. **Almenfarlige forbrydelser.**	“**Kapittul 20** **Alvandasom brotsverk**
§ 180. Sætter nogen ild til egen eller fremmed ejendom under sådanne omstændigheder, at han indser, at andres liv derved udsættes for overhængende fare, eller det sker med forsæt til at volde omfattende ødelæggelse af fremmed ejendom eller til at befordre oprør, plyndring eller anden sådan forstyrrelse af samfundsordenen, straffes han med fængsel indtil på livstid.	**§ 180.** Setir onkur eld á egna ella annans ogn undir slíkum umstøðum, at hann skilur, at hann harvið setir lívið hjá øðrum í hóttandi vanda, ella hann ger tað við tilætlan um at gera umfatandi skaða á annans ogn ella til at fremja uppreistur, púrgan ella aðra slíka órógv á samfelagsskipanina, verður hann revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
§ 181. Forvolder nogen ellers ildebrand på fremmed ejendom, straffes han med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, der med forsæt til at besvige brandforsikringen eller krænke panthaveres rettigheder eller med lignende retsstridigt forsæt forvolder ildebrand på egen ejendom eller på andens ejendom med ejerens samtykke. *Stk. 3.* Straffen kan stige til fængsel i 10 år, hvis der foreligger særligt skærpende omstændigheder.	**§ 181.** Tann, sum annars elvir til eldsbruna á annans ogn, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, sum við tilætlan um at svika brunatryggingina ella at gera seg inn á rættindi hjá veðhava, ella sum við líknandi løgleysari tilætlan elvir til eldsbruna á egna ogn ella á annans ogn við samtykki eigarans. *Stk. 3*. Revsingin kann vaksa til fongsul í upp til 10 ár, um talan er um serliga skerpandi umstøður.
§ 182. Den, som af uagtsomhed forvolder ildsvåde på fremmed ejendom eller til skade for fremmed formueinteresse, straffes med bøde eller fængsel indtil 2 år.	**§ 182.** Tann, sum av ósketni elvir til eldsbruna á annans ogn ella til bága fyri annans ognaráhugamál, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.
§ 183. Den, der med forsæt til skade på andres person eller formue forvolder sprængning, spredning af skadevoldende luftarter, oversvømmelse, skibbrud, jernbane- eller anden transportulykke, straffes med fængsel indtil 12 år. *Stk. 2.* Foretages en af de i stk. 1 nævnte handlinger under de i § 180 angivne omstændigheder, er straffen fængsel indtil på livstid.	**§ 183.** Tann, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella annans ogn elvir til spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, skipbrot ella aðra flutningsvanlukku, verður revsaður við fongsli í upp til 12 ár. *Stk. 2*. Verður ein gerð, sum nevnd er í stk. 1, framd undir teimum umstøðum, sum nevndar eru í § 180, er revsingin fongsul í upp til lívstíð.

Stk. 3. Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 2 år.	*Stk. 3*. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.
§ 183 a. Den, som ved ulovlig tvang, jf. § 260, tager kontrollen over et luftfartøj, et skib eller et andet kollektivt transportmiddel eller godstransportmiddel eller griber ind i dets manøvrering, straffes med fængsel indtil på livstid. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, som ved ulovlig tvang, jf. § 260, tager kontrollen over et offshoreanlæg.	**§ 183 a.** Tann, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á loftfari, sjófari ella øðrum felagsflutningsfari ella farmaflutningsfari ella órógvar stýringina, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð. *Stk. 2*. Á sama hátt verður tann revsaður, sum við ólógligum tvingsli sambært § 260 tekur ræðið á frálandsvirki.
§ 184. Med bøde eller fængsel indtil 2 år eller under skærpende omstændigheder med fængsel indtil 6 år, straffes den, der uden at være strafskyldig efter § 183 eller §183 a forstyrrer sikkerheden for jernbaners, fartøjers, motorkøretøjers eller lignende transportmidlers drift eller sikkerheden for færdsel på offentlige færdselsveje. *Stk. 2.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 4 måneder.	**§ 184.** Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir §§ 183 ella 183 a, órógvar rakstrartrygdina hjá førum, motorakførum ella slíkum flutningsførum ella ferðslutrygdina á leiðum, ið ætlaðar eru til almenna ferðslu. *Stk. 2.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.
§ 185. Med bøde eller fængsel indtil 2 år straffes den, som, uagtet det var ham muligt uden særlig fare eller opofrelse for sig selv eller andre, undlader gennem betimelig anmeldelse eller på anden efter omstændighederne tjenlig måde efter evne at afværge ildsvåde, sprængning, spredning af skadevoldende luftarter, oversvømmelse, søskade, jernbaneulykke eller lignende ulykke, der medfører fare for menneskeliv.	**§ 185.** Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum, hóast tað hevði borið honum til, uttan at hann ella onnur skuldu ovofrað seg, og uttan at hann skuldi komið sær sjálvum ella øðrum í nakran serligan vanda, letur vera við at geva rættstundis fráboðan um ella á annan eftir umstøðunum hóskandi hátt eftir førimuni at forða fyri eldsbruna, spreinging, at skaðaelvandi luftevni verða spjadd, vatnflóð, sjóskaða ella slíkari vanlukku, sum hevur við sær vanda fyri mannalívi.
§ 186. Den, som forvolder fare for menneskers liv eller sundhed ved at fremkalde almindelig mangel på drikkevand eller ved at tilsætte vandbeholdninger, vandledninger eller vandløb sundhedsfarlige stoffer, straffes med fængsel indtil 10 år.	**§ 186.** Tann, sum elvir til vanda fyri lívi ella heilsu manna við at elva til drekkivatnstrot ella við at lata heilsuskaðilig evnir í vatngoymslur, vatnleiðingar ella áir, verður revsaður við fongsli í upp til 10 ár.

Stk. 2. Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 1 år.	*Stk. 2*. Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.
§ 187. Med fængsel indtil 10 år straffes 1) den, der tilsætter ting, som er bestemt til forhandling eller udbredt benyttelse, gift eller andre stoffer, som medfører, at tingens benyttelse efter dens bestemmelse udsætter menneskers sundhed for fare, 2) den, der, når sådanne ting er således fordærvede, at nydelsen eller brugen af dem er på nævnte måde sundhedsfarlig, undergiver dem en behandling, der er egnet til at skjule deres fordærvede tilstand, 3) den, der med fortielse af den foretagne behandling stiller til salg eller i øvrigt søger at udbrede ting, der er behandlet som under 1) eller 2) nævnt. *Stk. 2.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 1 år.	**§ 187.** Við fongsli í upp til 10 ár verður tann revsaður: 1) sum í lutir, ið eru ætlaðir til at selja ella til algongda nýtslu, letur eitur ella onnur evni, soleiðis at heilsan hjá fólki kemur í vanda, um lutirnir verða brúktir samsvarandi endamálinum, 2) sum, tá ið slíkar lutir eru komnir soleiðis fyri spillu, at njótingin ella nýtslan av teimum á nevnda hátt er heilsuskaðilig, gevur teimum eina viðgerð, sum kann fjala spilluna, ella 3) sum við dyljing um framdu viðgerðina, setir til sølu ella aðramáta roynir at breiða út lutir, ið eru viðgjørdir soleiðis, sum nevnt er undir nr. 1 og 2. *Stk. 2.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 1 ár.
§ 188. Den, som uden at være strafskyldig efter § 187, nr. 3, med fortielse af tingens sundhedsfarlige beskaffenhed stiller til salg eller i øvrigt søger udbredt 1) nærings- eller nydelsesmidler, der på grund af fordærvelse, mangelfuld tilberedelse, opbevaringsmåde eller af lignende grunde er sundhedsfarlige, 2) brugsgenstande, der ved sædvanlig benyttelse udsætter menneskers sundhed for fare, straffes med bøde eller fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 4 måneder.	**§ 188.** Við sekt ella fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum, uttan at vera revsisekur eftir § 187, stk. 1, nr. 3, við dyljing um heilsuskaðiliga standin á lutinum setir til sølu ella aðramáta roynir at fáa breitt út: 1) føðsluevni ella njótingarevni, sum orsakað av spillu, vantandi tilgerð, goymsluhátti ella av líknandi orsøkum eru heilsuskaðilig, ella 2) nýtslulutir, sum við vanligum brúki seta heilsu manna í vanda. *Stk. 2.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.
§ 189. Den, som stiller til salg eller i øvrigt søger udbredt som lægemidler eller forebyggelsesmidler mod sygdomme ting, om hvilke han ved, at de er uegnede til det angivne formål, og at deres benyttelse hertil udsætter menneskers liv eller sundhed for	**§ 189.** Tann, sum setir til sølu ella aðramáta roynir at breiða út sum heilivág ella sjúkufyribyrgjandi evni, lutir, sum hann veit ikki eru nýtiligir til hesi endamál, og at nýtslan av teimum hartil setir lív ella heilsu manna í vanda, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár.

fare, straffes med bøde eller fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 4 måneder.	*Stk. 2.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir.
§ 190. Udsættes under tilsvarende betingelser som i §§ 186-189 angivet alene husdyrs liv eller sundhed for fare, er straffen bøde eller fængsel indtil 6 år.	**§ 190.** Verður undir samsvarandi treytum sum í §§ 186–189 bert lív ella heilsa hjá húsdýrum sett í vanda, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 ár.
§ 191. Den, som i strid med lovgivningen om euforiserende stoffer til et større antal personer eller mod betydeligt vederlag eller under andre særligt skærpende omstændigheder overdrager euforiserende stoffer, straffes med fængsel indtil 10 år. Angår overdragelsen en betydelig mængde særlig farligt eller skadeligt stof, eller har overdragelsen af et sådant stof i øvrigt haft en særlig farlig karakter, kan straffen stige til fængsel i 16 år. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, der i strid med lovgivningen om euforiserende stoffer indfører, udfører, køber, udleverer, modtager, fremstiller, forarbejder eller besidder sådanne stoffer med forsæt til at overdrage dem som nævnt i stk. 1.	**§ 191.** Tann, sum ímóti lóggávuni um euforiserandi evni til fleiri persónar ella fyri munandi gjald ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum avhendir slík evni, verður revsaður við fongsli í upp til 10 ár. Er talan um avhending av munandi mongd av serliga vandamiklum ella skaðiligum evni, ella hevur avhendingin av slíkum evni á annan hátt verið av serliga vandamiklum slagi, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 16 ár. *Stk. 2.* Somu revsing fær tann, sum ímóti lóggávuni um euforiserandi evni innflytur, útflytur, keypir, útflýggjar, tekur ímóti, framleiðir, viðger ella hevur um hendi slík evni við tilætlan um at avhenda tey, soleiðis sum nevnt er í stk. 1.
§ 191 a. (Strikað).	**§ 191 a.** Tann, sum ímóti løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum til fleiri persónar ella fyri munandi gjald ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum avhendir slík evni, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Somu revsing fær tann, sum ímóti løgtingslóg um forboð móti ávísum dopingevnum framleiðir, innflytur, útflytur, útbreiðir ella hevur um hendi slík evni við tilætlan um at avhenda tey, soleiðis sum nevnt er í stk. 1.
§ 192. Den, som ved overtrædelse af de forskrifter, der ved lov eller i medfør af lov er givet til forebyggelse eller modarbejdelse af smitsom sygdom, forvolder fare for, at sådan sygdom vinder indgang eller udbredes	**§ 192.** Tann, sum við broti á forskriftir, sum givnar eru við lóg ella sambært lóg til at fyribyrgja ella tálma smittusjúku, elvir til vanda fyri, at slík sjúka kemur inn í landið ella breiðir seg millum

blandt mennesker, straffes med fængsel indtil 3 år. *Stk. 2.* Er sygdommen en sådan, der ifølge lovgivningen skal undergives eller på den tid, da handlingen begås, er undergivet offentlig behandling, eller mod hvis indførelse i riget der er truffet særlige forholdsregler, er straffen fængsel indtil 6 år. *Stk. 3.* Den, som på den angivne måde forvolder fare for, at smitsom sygdom finder indgang eller udbredes blandt husdyr eller nytte- eller kulturplanter, straffes med fængsel indtil 2 år. *Stk. 4.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 6 måneder.	manna, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár. *Stk. 2.* Er talan um sjúku, sum sambært lóggávu krevur almenna viðgerð, ella sum er undir almennari viðgerð, tá ið gerðin verður framd, ella sum serlig tiltøk eru sett í verk til at verja fyri, at sjúkan kemur inn í landið, er revsingin fongsul upp til 6 ár. *Stk. 3.* Tann, sum á nevnda hátt elvir til vanda fyri, at smittusjúka kemur inn í landið ella breiðir seg millum húsdýr ella millum nýtsluplantur ella aliplantur, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár. *Stk. 4.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 mánaðir.
§ 192 a. Den, som besidder, bærer eller anvender skydevåben i strid med lagtingslovgivningen om våben m.v. under særlig skærpende omstændigheder, straffes med fængsel indtil 4 år, når overtrædelsen sker på offentligt tilgængeligt sted. *Stk. 2.* Den, som i strid med lagtingslovgivningen om våben m.v. og lagtingslovgivningen om sprængstoffer og sprængningsarbejde m.v. indfører, udfører, transporterer, erhverver, overdrager, besidder, bærer, anvender, tilvirker, udvikler eller med henblik på udvikling forsker i våben eller eksplosivstoffer, som på grund af deres særdeles farlige karakter er egnet til at forvolde betydelig skade, straffes med fængsel indtil 6 år.	**§ 192 a.** Tann, sum ímóti løgtingslóg um vápn v.m. undir serliga skerpandi umstøðum hevur skotvápn um hendi, hevur skotvápn uppi á sær ella nýtir skotvápn, verður revsaður við fongsli í upp til 4 ár, tá ið brotið fer fram á einum staði, har frítt er hjá almenninginum at koma.
§ 192 b. Den, der med forsæt til skade på andres person eller til betydelig skade på andres ting eller på miljøet modtager, besidder, overdrager eller ændrer radioaktive stoffer eller fremstiller eller besidder en eksplosiv nuklear anordning eller en anordning, der er beregnet til at sprede radioaktive stoffer eller kan udsende ioniserende stråling, straffes med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Med fængsel indtil 12 år straffes den, der med forsæt til skade på andres person eller til betydelig skade på andres ting eller	**§ 192 b.** Tann, sum við tilætlan um at gera skaða á annan persón ella munandi skaða á annans lutir ella á umhvørvið tekur ímóti, hevur um hendi, avhendir ella broytir geislavirkin evni ella framleiðir ella hevur um hendi sprongkvæman kjarnorkuútbúnað ella útbúnað, sum er ætlaður til at breiða út geislavirkin evni ella kann senda út jónandi geisling, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Við fongsli í upp til 12 ár verður tann revsaður, sum við tilætlan um at

på miljøet eller til at tvinge nogen til at foretage eller undlade at foretage en handling 1) anvender radioaktive stoffer eller anordninger, der udsender ioniserende stråling, 2) fjerner, ændrer eller beskadiger en nødvendig beskyttelse mod spredning af radioaktive stoffer eller mod ioniserende stråling eller 3) anvender eller beskadiger et nukleart anlæg med den følge, at der sker udslip af radioaktive stoffer eller fremkaldes fare derfor. *Stk. 3.* Foretages en af de i stk. 2 nævnte handlinger under de i § 180 angivne omstændigheder eller med den følge, at der sker omfattende skade på miljøet eller fremkaldes nærliggende fare derfor, er straffen fængsel indtil på livstid. *Stk. 4.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 2 år.	gera skaða á annan persón ella munandi skaða á annans lutir ella á umhvørvið ella at tvinga onkran til at gera ella lata vera við at gera okkurt: 1) nýtir geislavirkin evni ella útbúnað, sum sendir út jónandi geisling, 2) tekur burtur, broytir ella ger skaða á eina neyðuga verju ímóti útbreiðslu av geislavirknum evnum ella ímóti jónandi geisling, ella 3) nýtir ella ger skaða á eitt kjarnorkuverk við teirri fylgju, at tað kemur útlát av geislavirknum evni, ella at tað gerst vandi fyri tí. *Stk. 3.* Verður ein gerð, sum nevnd er í stk. 2, framd undir teimum umstøðum, sum nevndar eru í § 180, ella hevur hon við sær umfatandi skaða á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí, er revsingin fongsul í upp til lívstíð. *Stk. 4.* Verður brotsverkið gjørt av ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 2 ár.”
21de kapitel. **Forskellige almenskadelige handlinger.**	**5.** Kapittul 21 verður orðaður soleiðis: “**Kapittul 21** **Ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin**
§ 193. Den, som på retsstridig måde fremkalder omfattende forstyrrelse i driften af almindelige samfærdselsmidler, offentlig postbesørgelse, telegraf- eller telefonanlæg, radio- eller fjernsynsanlæg, informationssystemer eller anlæg, der tjener til almindelig forsyning med vand, gas, elektrisk strøm eller varme, straffes med bøde eller fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Begås forbrydelsen uagtsomt, er straffen bøde eller fængsel indtil 6 måneder.	**§ 193.** Tann, sum á løgleysan hátt elvir til umfatandi órógv í rakstrinum av vanligum samferðslutólum, almennum postflutningi, telegrafútbúnaði ella telefonútbúnaði, útvarpsútbúnaði ella sjónvarpsútbúnaði, kunningarskipanum ella útbúnaði til vanliga veiting av vatni, gassi, elektriskum streymi ella hita, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Verður brotsverkið framt av grovum ósketni, er revsingin sekt ella fongsul í upp til 6 mánaðir.
§ 194. Den, der borttager, ødelægger eller beskadiger offentlige mindesmærker eller genstande, som er bestemte til almindelig nytte eller pryd, hører til offentlige	**§ 194.** Tann, sum tekur burtur, oyðileggur ella ger skaða á almenn minnismerki ella lutir, sum eru ætlaðir til vanliga nýtslu ella prýði, hoyra til

samlinger eller er særlig fredlyste, straffes med bøde eller fængsel indtil 3 år.	almenn søvn ella eru serliga friðað verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 3 ár.
§ 195. Den, som stiller levnedsmidler til salg, der ham bevidst er eftergjort eller forfalsket, uden at deres særlige beskaffenhed på utvetydig måde er angivet på varen selv eller på dens etikette eller indpakning samt på fakturaen, hvis en sådan udstedes, straffes med bøde eller fængsel indtil 3 måneder.	**§ 195.** Tann, sum setur matvøru til sølu, vitandi um, at hon er eftirgjørd ella falsað, uttan at hetta á ótvískildan hátt stendur á vøruni sjálvari, merkiseðlinum ella innpakkingini og á fakturanum, um slíkur verður latin, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 3 mánaðir.
§ 196. Med fængsel indtil 6 år straffes den, der under skærpende omstændigheder i strid med miljølovgivningen 1) forurener luft, vand, jord eller undergrund med den følge, at der sker betydelig skade på miljøet eller fremkaldes nærliggende fare derfor, eller 2) opbevarer eller bortskaffer affald eller lignende stoffer med den følge, at der sker betydelig skade på miljøet eller fremkaldes nærliggende fare derfor. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, der i strid med miljølovgivningen forurener luft, vand, jord eller undergrund eller opbevarer eller bortskaffer affald eller lignende stoffer, når der er tale om overtrædelser af mere systematisk eller organiseret karakter.	**196.** Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum undir skerpandi umstøðum ímóti umhvørvislóggávuni: 1) dálkar luft, vatn, jørð ella undirgrund við teirri fylgju, at munandi skaði kemur á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí, ella 2) goymir ella burturbeinir burturkast ella líknandi evni við teirri fylgju, at munandi skaði kemur á umhvørvið, ella at tað verður elvt til nærliggjandi vanda fyri tí. *Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, sum ímóti umhvørvislóggávuni dálkar luft, vatn, jørð ella undirgrund ella goymir ella burturbeinir burturkast ella líknandi evni, tá ið brotið er av meira regluligum ella skipaðum slagi.”
“**Kapittul 22** **Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi**	**6.** Kapittul 22 verður orðaður soleiðis: “**Kapittul 22** **Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi**
§ 197. Tann, sum ímóti ávaring frá løgregluni ger seg sekan í at bidda, ella sum loyvir, at nakar undir 18 ár, sum hoyrir til húski hansara, biddar, verður revsaður við fongsli í upp til 6 mánaðir. Undir linnandi umstøðum kann revsingin detta burtur. Ávaring sambært hesi áseting hevur gildi í 5 ár.	**§ 197.** Tann, sum ímóti ávaring frá løgregluni ger seg sekan í at bidda, ella sum loyvir, at nakar undir 18 ár, sum hoyrir til húski hansara, biddar, verður revsaður við fongsli í upp til 6 mánaðir. Undir linnandi umstøðum kann revsingin detta burtur. Ávaring sambært hesi áseting hevur gildi í 5 ár.
§ 198. (Strikað).	**§ 198.** (Strikað).

§ 199. Gongur nakar fyri einki undir slíkum umstøðum, at orsøk er at halda, at hann ikki roynir at vinna sær til lívsins uppihald á lógligan hátt, skal viðkomandi frá løgregluni fáa boð um at søkja sær lógligt starv innan ásetta rímiliga freist ella, um til ber, fáa slíkt starv ávíst. Ger hann ikki eftir boðunum, verður hann revsaður við fongsli í upp til 1 ár. Boðini frá løgregluni galda í 5 ár. *Stk. 2*. Sum lógligt starv er ikki at rokna spæl, prostitutión ella stuðul frá persónum, sum arbeiða sum prostituerað.	**§ 199**. Gongur nakar fyri einki undir slíkum umstøðum, at orsøk er at halda, at hann ikki roynir at vinna sær til lívsins uppihald á lógligan hátt, skal viðkomandi frá løgregluni fáa boð um at søkja sær lógligt starv innan ásetta rímiliga freist ella, um til ber, fáa slíkt starv ávíst. Ger hann ikki eftir boðunum, verður hann revsaður við fongsli í upp til 1 ár. Boðini frá løgregluni galda í 5 ár. *Stk. 2*. Sum lógligt starv er ikki at rokna spæl, prostitutión ella stuðul frá persónum, sum arbeiða sum prostituerað.
§§ 200–202. (Strikaðar).	**§§ 200–202.** (Strikaðar).
§ 203. Tann, sum roynir at vinna sær til lívsins uppihald við váðaspæli ella samsvarandi vedding, sum ikki er loyvt sambært serligari áseting, ella sum fremur slíkt spæl, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár. *Stk. 2.* Rætturin ger av, um vinningurin skal verða inndrigin ella afturgoldin.	**§ 203.** Tann, sum roynir at vinna sær til lívsins uppihald við váðaspæli ella samsvarandi vedding, sum ikki er loyvt sambært serligari áseting, ella sum fremur slíkt spæl, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár. *Stk. 2.* Rætturin ger av, um vinningurin skal verða inndrigin ella afturgoldin.
§ 204. Tann, sum á almennum staði hýsir ella fyriskipar óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir. *Stk. 2.* Sum alment stað er eisini at rokna felagshøli, tá ið antin øll ella øll í ávísari samfelagsstætt vanliga kunnu innlimast í felagið, ella tá ið óloyvt váðaspæl er partur av endamáli felagsins, ella tá ið serligt gjald verður goldið fyri at luttaka í spælinum. *Stk. 3.* Tann, sum á almennum stað luttekur í óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt.	**§ 204.** Tann, sum á almennum staði hýsir ella fyriskipar óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir. *Stk. 2.* Sum alment stað er eisini at rokna felagshøli, tá ið antin øll ella øll í ávísari samfelagsstætt vanliga kunnu innlimast í felagið, ella tá ið óloyvt váðaspæl er partur av endamáli felagsins, ella tá ið serligt gjald verður goldið fyri at luttaka í spælinum. *Stk. 3.* Tann, sum á almennum stað luttekur í óloyvdum váðaspæli, verður revsaður við sekt.
§§ 205–207. (Strikaðar)."	**§§ 205–207.** (Strikaðar)."
23de kapitel. **Forbrydelser i familieforhold.**	**7.** Kapittul 23 verður orðaður soleiðis: **"Kapittul 23** **Brotsverk í familjuni**

§ 208. Gift person, som indgår ægteskab, straffes med fængsel indtil 3 år eller, hvis den anden person har været uvidende om det bestående ægteskab, med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* Begaas Handlingen af grov Uagtsomhed, er Straffen Fængsel indtil 1 Aar. *Stk. 3.* Ugift person, som indgår ægteskab med gift person, straffes med fængsel indtil 1 år. *Stk. 4.* Det skal betragtes som en formildende omstændighed for den, der i forvejen er gift, hvis det seneste ægteskab ikke kan omstødes. Under samme betingelse kan straffen for den person, der ikke er gift helt bortfalde.	**§ 208.** Tann, sum longu er giftur og gongur í hjúnalag, verður revsaður við fongsli í upp til 3 ár ella, um hin persónurin hevur verið óvitandi um verandi giftu, við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Verður gerðin framd av grovum ósketni, er revsingin fongsul upp til 1 ár. *Stk. 3.* Tann, sum uttan sjálvur at vera giftur gongur í hjúnalag við einum, sum longu er giftur, verður revsaður við fongsli í upp til 1 ár. *Stk. 4.* Tað skal roknast sum linnandi umstøður fyri tann, sum longu er giftur, um síðsta gifta ikki kann ógildast. Undir somu treytum kann revsingin heilt detta burtur fyri tann, sum ikki er giftur.
§ 209. (Strikað).	**§ 209.** (Strikað).
§ 210. Tann, sum hevur samlegu við skyldfólk í fallandi legg, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Ættleiðing verður javnsett við biologiskan skyldskap. *Stk. 2.* Tann, sum hevur samlegu við bróður sín ella systur sína, verður revsaður við fongsli í upp til 2 ár. Revsingin kann detta burtur hjá tí, sum er undir 18 ár. *Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.	**§ 210.** Tann, sum hevur samlegu við skyldfólk í fallandi legg, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. Ættleiðing verður javnsett við lívfrøðiligan skyldskap. *Stk. 2.* Tann, sum hevur samlegu við bróður sín ella systur sína, verður revsaður við fongsli í upp til 2 ár. Revsingin kann detta burtur hjá tí, sum er undir 18 ár. *Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 og 2 galda eisini fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu.
§ 211. (Strikað). **§ 212.** (Strikað).	**§§ 211–212.** (Strikaðar).
§ 213. Den, som ved vanrøgt eller nedværdigende behandling krænker sin ægtefælle, sit barn eller nogen hans myndighed eller forsorg undergiven person under 18 år eller en i opstigende linie beslægtet eller besvogret, eller som ved modvillig at unddrage sig en ham overfor nogen af de nævnte personer påhvilende forsørgelses- eller bidragspligt udsætter dem for nød, straffes med fængsel indtil 2 år.	**§ 213.** Tann, sum við vanrøkt ella niðrandi viðferð ger seg inn á hjúnafelaga sín, barn sítt ella annan persón undir 18 ár, sum er undir hansara myndugleika ella umsorgan, ella skyldfólk ella svágd í rísandi legg, ella sum andhugaður sleppir sær undan uppihaldsskyldu ella gjaldskyldu, sum honum er áløgd yvir fyri einum av nevndu persónum, og harvið kemur teimum í neyð, verður revsaður við fongsli í upp til 2 ár.
§ 214. (Strikað).	

	§ 214. (Strikað).
§ 215. Den, som unddrager en person under 18 år forældres eller anden rette vedkommendes myndighed eller forsorg eller bidrager til, at han unddrager sig sådan myndighed eller forsorg, straffes efter reglerne i § 261. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, der ulovligt fører barnet ud af landet.	**§ 215.** Tann, sum heldur einum persóni undir 18 ár frá myndugleika ella umsorgan hjá foreldrum ella øðrum røttum viðkomandi, ella sum stuðlar uppundir, at persónurin skilur seg frá slíkum myndugleika ella slíkari umsorgan, verður revsaður eftir reglunum í § 261. *Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, sum ólógliga førir barnið út úr landinum.”
§ 125 a. Tann, sum fyri vinning ella undir aðramáta serliga skerpandi umstøðum ger seg sekan í menniskjasmugling sambært § 59, stk. 8, nr. 1-5 í Udlændingeloven, sum sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, verður revsaður við fongsli í upp til 8 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna slíkar, har vandi er fyri lívinum hjá øðrum, ella tá ið talan er um reglulig ella skipað brotsverk.	**8.** Í § 125 a, 2. pkt. verður “tá ið talan er um reglulig ella skipað brotsverk” broytt til: “tá ið talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slagi”.
§ 236. Tann, sum breiðir út pornografiskar myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár. Sum serliga skerpandi umstøður eru av øllum at rokna umstøður, har vandi er fyri lívinum hjá barninum, har ið grovur harðskapur verður nýttur, har barnið fær álvarsaman skaða, ella umstøður, har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu. *Stk. 2-3.* ...	**9.** Í § 236, stk. 1, 2. pkt verður “har ið talan er um regluliga ella skipaða útbreiðslu” broytt til: “har ið útbreiðslan er av meira regluligum ella skipaðum slagi”.
§ 236. ... *Stk. 2.* Tann, sum eigur ella keypir ella gjøgnum internetið ella tílíka skipan til at breiða út upplýsingar útvegar sær atgongd til myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár. *Stk. 3.* ...	**10.** Í § 236, stk. 2 verður “eigur ella keypir” broytt til: “hevur um hendi ella móti gjaldi”.

§ 252. Tann, sum við vinningi í huga, í grovum ovfarakæti ella á tílíkan fyrilitarleysan hátt elvir til hóttandi vanda fyri lívi ella likamsførleikum hjá øðrum persóni, verður revsaður við fongsli í upp til 8 ár. *Stk. 2-3. ...*	**11.** Í § 252, stk. 1 verður "hóttandi vandi" broytt til: "nærliggjandi vandi".
§ 263. ... *Stk. 2. ...* *Stk. 3.* Verður áseting í stk. 1 ella 2 brotin tilætlað fyri at skaffa sær atgongd til ella fyri at gera seg kunnigan við upplýsingar um vinnulig loyndarmál hjá fyritøku ella undir øðrum serliga skerpandi umstøðum, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 6 ár. Á sama hátt verða revsað reglulig ella skipað brot á stk. 2.	**12.** § 263, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Á sama hátt verða tær gerðir, ið eru nevndar í stk. 2, revsaðar, um talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slagi."
§ 293. ... *Stk. 2.* Tann, sum av órøttum forðar øðrum í heilt ella lutvíst at ráða yvir luti, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 1 ár. Revsingin kann vaksa til fongsul upp í 2 ár, um talan er um regluligt ella skipað brot, ella um tað í aðramáta er talan um serliga skerpandi umstøður.	**13.** Í § 293, stk. 2 verður "um talan er um regluligt ella skipa brot" broytt til: "um talan er um brot av meira regluligum ella skipaðum slagi.
299 a. Við fongsli í upp til 6 ár verður tann revsaður, sum undir serliga skerpandi umstøðum brýtur § 19 í løgtingslóg um marknaðarføring. Sum serliga skerpandi umstøður eru serstakliga at rokna tilburðir, har gerðin hevur elvt til munandi skaða ella hevur skapt sannlíkan vanda fyri tí.	**14.** Í § 299 a verður "sannlíkan vanda" broytt til: "nærliggjandi vanda".
	15. Bilag 1 í Revsilógini verður orðað sum ásett í skjali 1.
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer lov nr. 149 af 2. august 1914 hvorved det forbydes fra dansk territorium at understøtte krigsførende magter úr gildi.